

Andrew-boripallurin hjá BP í Norðsjónum. Mynd: BP

# BP vil hava skotar at siga nei

**Jógvan Hugo Gardar**

18.09.2014 - 19:17

Oljan.fo

Oljufelagið BP heitir í einum brævi til skotar um at siga nei til sjálvstýri. Brævið er almannakunngjørt á heimasíðuni hjá BP.

Stjórin í BP, Bob Dudley, sigur at sum ein av stóru íleggjarunum í Skottlandi seinastu 50 árini, og sum eitt felag sum ynskir at halda fram í Skottlandi, so er best at Skottland verður verandi undir politisku leiðsluni í London.